**Landssjúkrahúsið**
100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar

Á B5 eru tvey føst størv sum sjúkrarøktarfrøðingur leys at søkja til setan 1. mars 2003 ella skjótast gjørligt:

- starvsbrøkur 0,7 í kvøldvakt
- starvsbrøkur 0,6 í kvøld- og náttarvakt

Deildin er ein kirurgisk deild við servitan innan ortopæði, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 25 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á B5 á telefon 31 35 40, lokal 105 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktafrøðing, lokal 499 L, e-postur ceci@ahs.fo

Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi:
- sum hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- sum hevur fakliga vitan og royndir innan kirurgiskari sjúkrarøkt
- við fleksibiliteti og góðum samstarvsevnum
- sum er opin og positiv
- sum vil søkja mennandi avbjóðingar

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 24. januar 2003 kl. 12.00.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

# Frá S&K-felagnum

**Avloysari til skristovustarv**

S&K-felagið søkir eftir avloysara fyri skrivstovufólk, ið er í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at upplýsa limir felagsins um rættindi og skyldur sambært sáttmálum og viðkomandi lógum.

Tann, ið settur verður kemur, at byrja skjótast gjørligt og er arbeiðstíðin 20 tímar um vikuna fyrrapartar.

Løn sambært S&K-sáttmálanum.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**S&K-felagið**
Postsmoga 1378

**Landssjúkrahúsið**
100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingur

Til barnadeildina **B4** verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi til fast starv á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum til setan 1. mars 2003.

B4 er ein barnadeild við 13 plássum fyri børnum í aldrinum 0-14 ár. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar, pedagogur og barnalæknar.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Tove Thomsen, deildarleiðara, telefon 31 35 40, lokal 104 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 300, e-post asap@ahs.fo

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúrkarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 24. januar 2002 kl. 12.00.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kungerð

Í 2003 hevur Tórshavnar býráð regluligan fund hesar hósdagar, kl. 18.00:

30. januar
20. februar
13. mars
10. apríl
22. mai
26. juni
28.august
25. september
23. oktober
20. november
18. desember

Tórshavnar býráð

SNARSKIVAN

www.sosialurin.fo

# Húsavørður

Eiðis kommuna søkir við hesum eftir húsavørði til skúlan, ítróttarhøllina og aðrar bygningar hjá Eiðis kommunu.

**Arbeiðsuppgávurnar eur m.a. hesar:**
- at røkja bygningarnar og økið uttanum
- at gera umvælingar
- at halda reint og rudduligt inn og úti um høllina og skúlan
- at hava umsjón við og samskipa reingerðingina av skúla og ítróttarhøll
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- at trygdarbúnaður virkar sambært ásettum krøvum
- at hava samskifti við tey, ið nýta høllina

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava handverkaraútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður ætlandi sett 1. februar 2003. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meir fæst at vita**
við at venda sær til borgarstjóran á tlf. 423012 ella 213312.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og viðmælum skal vera Eiðis kommunu í hendi í seinasta lagi 22. januar 2003.

Umsóknin skal vera merkt: »**Húsavørður**«.

# Avloysari sum dagrøktari

Søkt verður eftir avloysara fyri dagrøktarmammu sum fer í barnsburðarfarloyvi frá 01. feb. 2003 til 18.07.2003.
Dagrøktarheimið skal vera innrætta barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í – og hóskandi, trygt spæliøkið uttanfyri.

Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn skal verða Dagrøktini í hendi innan 20.01.03.

**Dagrøktarskipanin í Sørvági**
**380 Sørvágur · Tlf. 213122**

# Hús í Kvívík

Sethús í Kvívík til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 421680**
eftir kl. 18.00

**Fiskimálaráðið**

# Skeiðlærari til Trygdarmiðstøðina fyri sjófólk

Vegna økt virksemi, søkir Trygdarmiðstøðin í Klaksvík hervið eftir einum persóni, sum kann undirvísa í trygd á sjónum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- Undirvísa í trygd á sjónum, sum umfatar bæði ástøðiliga frálæru og venjingar í at nýta bjargingar- og eldsløkkiútgerð v.m.
- Vera við til at menna og gera frálærutilfar í samsvar við altjóða krøv og tørvin hjá vinnuni
- Vera við til vanligt viðlíkahaldsarbeiði á venjingarstøðini.

**Førleikakrøv:**
- Tað verður sett sum krav, at umsøkjari skal hava útbúgving sum navigatørur við royndum frá sjóvinnuni ella frá frálandavinnuni.
- Fyrimunur er, um viðkomandi hevur royndir í at undirvísa og fyriskipa trygdarvenjing umborð á skipi.

Viðkomandi, sum settur verður, skal kunna taka ymisk endurútbúgvingarskeið, sum eru viðkomandi fyri starvið.

**Setanartreytir:**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálaráðið, og stovnar/deildir undir tí, umframmt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovan. Tænastustaðurin er í løtuni Trygdarmiðstøðin í Klaksvík.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. februar 2003 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið**
Att.: Sjóvinnufyrisitingin,
Postsmoga 347 · 110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Trygdarmiðstøðina á tlf. 455882, og tosa við Marius Magnusson, leiðara, ella til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Mary J. í Garði fíggjarfulltrúi.

# Dagrøktari

søkist til dagrøktina í Sørvági.

Dagrøktarheimið skal vera innrætta barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í – og hóskandi, trygt spæliøkið uttanfyri.

Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi innan 10.01.03.

**Dagrøktarskipanin í Sørvági**
**380 Sørvágur · Tlf. 213122**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2386, Sp/f Hvíthamar, 490 Strendur.

**Viðtøkur broyttar:** 17.12.2002.
**Nýtt navn:** Sp/f Sjósøki
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Arne Frederiksberg, 490 Strendur.
Innkomin sum stjóri: Martin Hilmar Frederiksberg, 490 Strendur.

*Skráseting Føroya tann 6. januar 2003*

*Kristin Balle*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Tað er feitt




Thrane & Thrane

**easyTrack - TT3026M**
Inmarsat C
Antenna, Sendari, Mótakari & 12 kanal GPS
Alt í einari eind.

Prísur úr einans **17.363,-** uttan mvg.
við 5m. Kaðal & beslag til 1“ rør

Vikmar
Vestara Bryggja - 100 Tórshavn
Tel. 35 21 82 - Fax 35 21 83
www.vikmar.fo - Email info@vikmar.fo




OPIÐ
Má-hó 10.00-17.30
Fr 10.00-18.00
Ley 10.00-14.00
*Vit senda um alt landið*

BETHEL
Kristiligur bóka- og fløguhandil
N. Finsensgøta 38 (omanfyri sjónleikarhúsið)
Tlf. 316560